| **Bólkur:**<br>Maskin | **Skeiðsnavn:**<br>Maskinlæra (Maskinprojekt) | **Skeiðsnummar:**<br>330 – a |
|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| **Plaserað:** 6. lestrarhálvár | **Varir:** Eitt hálvár | **ECTS:** 6 (330 a+b) |
| **Støða:** Kravd lærugrein | **Gjørt:** 18-08-2005 | **Reviderað:** 27-11-2012 |

| | |
|---|---|
| **Endamál:** | Geva tí lesandi eina djúptøkna vitan og kunnleika til skips-, kraftverksog/ ella ídnaðaranlegg, har høvuðsvektin er løgd á at skilja samanhangin millum virkimáta og rakstur við serligum atliti til viðurskifti, ið hava við trygd, rakstrarbúskap, umhvørvið og viðlíkahald. |
| **Høvuðsinnihald:** | Næmingarnir í M6 skulu í modulinum 330 a projektera og dimensionera maskinanleggið í einum handilsskipi (ferðamanna- elle farmaskip).<br>Veljast skal eitt skipaslag og støddin skal fastleggjast: Deyðvekt, deplacement, longd, breidd, dýbgangur og serviceferð.<br>Einfalt General Arrangement skal gerast, ið vísur lastarúm, maskinrúm og aptering. Her skal gerast uppstalt, dekksplanir og tvørskurður av skipinum.<br>Útrokningar skulu gerast fyri at finna framdráttarmegina útfrá ferðini á skipinum (propellarkurvan). Høvuðs- og hjálpimaskinarí skal fastleggjast og elnýtslan hjá skipinum skal fastleggjast fyri ymsar rakstrarhættir.<br>Maskinrúm verða meira nágreiniliga projektera, har víst verður, hvar teir ymsu komponentarnir eru uppsettir.<br>Útrokningar verða gjørdar av oljunýtslu hjá og útlátum frá maskinarínum.<br>$CO_2$ – index verður útroknað fyri skipið. Fyri eina ávísa sigling skal samanbering gerast av oljunýtslu og harvið kostnaði av at sigla, um ferðin verður 10% minni. Avleiðingar fyri útlátið verða eisini kannaðar. |
| **Undirvísingarháttur:** | Sjálvstøðugt projektarbeiðið við læraravegleiðing. |
| **Kravdar fortreytir:** | Øll maskinlærumodul fram til 6. hálvár. |
| **Fortreytir góðar at hava:** | |
| **Evaluering:** | Munnlig próvtøka saman við moduli 330b.<br>Próvdøming eftir 7-trins stiganum við uttanhýsis próvdómara |
| **Vegleiðandi undirvísingartilfar:** | Ymisk tilfar og kompendiir, sum lærarin útleverar. Tilfar sum næmingarnir<br>sjálvir fáa til vega frá fyritøkum ella internetinum. |
| **Viðmerkingar:** | Maskinprojekt er ein partur av modulinum 330 sum eisini umfatar Umhvørvi<br>6 tímar um vikuna eru til modulið. |
| **Ábyrgdari:** | NJ |